Fróðskaparsetur Føroya

20. januar 2009

**Frágreiðing til stýrisfund nr. 1/2009**

Dagur og klokkutíð: Hósdagin 15. januar 2009 kl. 11.00-17.40

Fundarstað: Søgu- og samfelagsdeildin, Jónas Broncks gøtu 25, 4. hædd

Á fundi: Stýrislimir: Lis Mortensen, Bogi Davidsen, Tove Bull, Jan Mortensen, Winny í Pætursastovu, Robert James (Jim) Brown og Anni Djurhuus.
Varastýrislimir: Kristianna Sjóvará, Juanna S. Joensen, Dávur Eyðunsson Sørensen, Ása Róin og Guðrið Krúnufjall.
Frá Mentamálaráðnum: Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna í mentamálum, Leivur Harryson, aðalstjóri og Jørgen Meitilberg, fulltrúi.
Frá Setursskrivstovuni: Jóan Pauli Joensen, rektari, Rúna Hjelm, fyrisitingarstjóri og Hugin Skaalum, fíggjarleiðari.
Þorsteinn Gunnarsson, varastýrislimur gav avboð, og Eyðfinn Egholm, varastýrislimur møtti ikki.
Helena Dam á Neystabø var við til málsviðgerðina av málunum 4-8.
Jan Mortensen, Leivur Harryson og Anni Djurhuus vóru við til málsviðgerðina av málunum 1-8. Jørgen Meitilberg var við til viðgerðina av málunum 1-5. Dávur Eyðunson Sørensen var við til málsviðgerina av málunum 1-11.
Til viðgerðina av máli 5 vóru bert teir 7 stýrislimirnir til staðar.

**Dagsskrá:**

1. **Rektarin, Jóan Pauli Joensen, bjóðaði vælkomin.**
Rektarin bjóðaði øllum vælkomnum, og hann mælti til, at rektarin og fyrisitingarstjórin vóru skrivarar á fundinum. Hetta varð góðkent av stýrislimunum.

2. **Gjøgnumgongd av lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya við denti á málsræði og heimildir hjá stýrinum, bygnaði og menning av Fróðskaparsetrinum og starvsskipan fyri virksemið á Fróðskaparsetrinum.**
Lógin og viðmerkingarnar til lógina fyri Fróðskaparsetur Føroya vórðu viðgjørd og umrødd við serligum denti á kapitul 4 í lógini. Rektarin boðaði frá, at fleiri kunngerðir við støði í nýggju lógini eru á veg. Stýrislimir ynsktu at fáa yvirlit við strikumynd av bygnaðarskipanini á Fróðskaparsetrinum sum grundarlagi fyri eini virkisskipan fyri Setrið sambært § 11 stk. 2 og 5 í lógini um Fróðskaparsetur Føroya. Eisini høvdu stýrislimir ynski um, at eitt akademiskt ráð verður sett sambært § 18 í lógini.


| Poststaður | Bústaður | Heimasíða | T-postur | Telefon | Faks |
|---|---|---|---|---|---|
| Postrúm 272<br>FO 110 Tórshavn | J. C. Svabos gøta 14<br>FO 100 Tórshavn | www.setur.fo | setur@setur.fo | 35 25 00 | 35 25 01 |

3. **Kunning um undirvísing og gransking á Fróðskaparsetrinum. Fyrisitingarstjórin, Rúna Hjelm, greiddi frá.**
Tikið til eftirtektar. Eftir at hetta mál varð liðugt, endaði fyrsti fyrireikandi partur av fundinum, og matarsteðgur var.

4. **Landsstýriskvinnan í mentamálum, Helena Dam á Neystabø, setti stýrið formliga.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Eftir matarsteðgin setti Helena Dam á Neystabø stýrið formliga, og hon segði m.a. í røðu síni, at tað er umráðandi, at Fróðskaparsetur Føroya framyvir leggur dent á opinleika í samansjóðingini av Fróðskaparsetri Føroya, Føroya Læraraskúla og Sjúkrarøktarfrøðiskúla Føroya, tí hon væntaði, at tað sum frá líður fór at koma fitt av synergi í hesum samstarvi. Hon var greið yvir, segði hon, at tilgongdin kravdi tíð, tí tað bar neyvan til at samansjóða ymiskar organisatiónskulturar eftir einum degi. Hon sá nógvar møguleikar í eini samskipan og menning av útbúgvingartilboðunum í samstarvi við onnur universitet og við at leggja dent á fjarundirvísing. Hon duldi ikki fyri, at støðan var kritisk í løtuni, tí hóast hon hevði viljað tað øðrvísi, so var eisini hon sum landsstýriskvinna noydd at boyggja seg fyri vilja Løgtingsins. Tað hevur stóran týdning at arbeiða fyri, at Fróðskaparsetrið fær góðvild í fólki okkara, tí harvið fær Setrið eisini góðvild millum politikararnar. Tað eigur at verða arbeitt miðvíst við at "branda" Fróðskaparsetrið, og stýrið eigur at formulera virknar strategiir í hesum sambandi.

5. **Stýrið skipaði seg.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Eftir at landstýriskvinnan formliga hevði sett stýrið, fóru øll uttan stýrislimirnir úr fundarhølinum, meðan stýrið skipaði seg. Stýrið skipaði seg við Lis Mortensen sum forkvinnu og Boga Davidsen sum næstformanni. Boðað varð frá, at stýrið hevði tikið avgerð um, at um 1 ár skuldi stýrið skipa seg av nýggjum. Stýrisformaðurin tók yvir fundarleiðsluna tað sum eftir var av stýrisfundinum.

6. **Fundasamsýningar til stýrið.** (J.nr. (3) 10-01-20070018).
Tað varð sagt, at umframt eina hóskandi samsýning og goldnar útreiðslur fyri ferðing og gisting skulu stýrislimir eisini fáa møguligan lønarmiss endurgoldnan. Eisini skal ein ábyrgdartrygging teknast fyri stýrislimirnar. Landsstýriskvinnan í mentamálum lovaði saman við aðalstjóranum at kanna eftir, hvat er vanligt og hóskandi at lata í samsýning, og at greiði skuldi verða fingið á spurninginum um endurgjald fyri lønarmiss. Fyri ferðing og gisting eru fastar reglur. Avgjørt varð, at á komandi stýrisfundi verður endalig støða tikin til hetta mál.

7. **Frágreiðing um Fróðskaparsetur Føroya fyri tíðarskeiðið 1. august – 31. desember 2008.** (J.nr. (3) 10-05-20070019).
Av tí at rektarin í tíðarskeiðnum frá 1. august til 31. desember 2008 hevur verið konstitueraður uttan stýri, men ístaðin arbeitt í neyvum samráð við Mentamálaráðið, legði hann fram eina frágreiðing um hetta tíðarskeiðið. Frágreiðingin var tikin til eftirtektar.

8. **Kunning um fíggjarstatus fyri 2008. Fíggjarleiðarin, Hugin Skaalum, greiddi frá.** (J.nr. (3) 10-12-20070008).
Frágreiðingin viðvíkjandi fíggjarstatus fyri setursskrivstovuna og deildirnar á Fróðskaparsetrinum varð løgd fram og góðkend.
Fíggjarstatus fyri Læraraskúlan og Sjúkrarøktarfrøðiskúlan í 2008 verður løgd fram og viðgjørd á komandi stýrisfundi 12. mars 2009.

9. **Kunning um fíggjarjáttanina fyri 2009 og viðgerð av skerjingum í játtanini. Rúna Hjelm greiddi frá.** (J.nr. (3) 10-12-20070011).

Í sambandi við fíggjarjáttanina fyri 2009 er Fróðskaparsetrið komið í stórar fíggjarligar trupulleikar, eftir at tað í samráð við Mentamálaráðið hevur tikið stig til at fremja eina menningarætlan yvir eitt trý ára skeið, sum semja var um at gera. Grundin til hetta er, at Løgtingið eftir tilráðing frá fíggjarnevndini hevur skorið 5,3 mió. kr av uppskotinum til játtan fyri 2009. Bæði í álitinum frá meirilutanum í fíggjarnevndini (s. 15) og í fjølmiðlunum hevur fíggjarnevndarformaðurin sáað iva um útrokningarnar, sum fyrisitingin á Setrinum hevur gjørt av fíggjartørvinum fyri 2009. Í álitinum verður beinleiðis sagt, at sambært útrokningum hjá nevndini er játtanin til Setrið 5,3 mió ov høg. Hvussu fíggjarnevndin er komin til hesa niðurstøðu, er ilt hjá okkum at siga, men ein frágreiðing kann vera, at virksemið hjá Granskingardeplinum fyri samfelagsmenning áljóðandi 1,262 tkr. er óbroytt flutt til Fróðskaparsetur Føroya at umsita. Hetta er virksemi, sum frammanundan hevur havt eitt sjálvstøðugt rakstrarstað í fíggjarlógini, og er henda hækkingin á 1,262 tkr tískil ikki ein meirjáttan til Fróðskaparsetur Føroya í 2009. Við øðrum orðum er samlaða nettojáttanin til virksemi hjá Fróðskaparsetur Føroya, um játtanin til Granskingardepilin verður drigin frá, kr. 24,702 tkr., sum svarar til umleið 3% hækking í mun til játtanina fyri 2008. Hetta er tó ein niðurskurður uppá 5,3 mió. kr. í mun til tær 31,3 mió.kr., sum fyribilsfíggjarlógin legði upp til, og sum Setrið eisini hevur roknað út sum eina minimumsjáttan, um Setrið skal megna at gjalda øktar lønir og rakstur fyri 2009. Henda hækkingin er sum áður nevnt ein beinleiðis avleiðing av fleiri nýggjum starvssetanum í 2008 umframt útreiðslur til nýggjan leiðslubygnað, sum nýggja lógin fyri Fróðskaparsetur Føroya ásetur. Niðurskurðurin rakar serliga hart, av tí at parturin til rakstur í 2009 er minkaður frá 19-24% av heildarjáttanini niður í 11% í 2009. Metti minstitørvur til rakstur í 2009 er kr. 5.441 tkr. ella 18% av heildarjáttanini. Stýrið dugdi tí ikki at síggja annað enn, at í fyrsta umfari skal einki leyst starv setast. Við hesum kunnu sparast kr. 1.907 tkr., og kemur tað fyrst og fremst at ganga út yvir Søgu- og samfelagsdeildina. Leiðslan á Setrinum skal saman við stýrisformanni og næstformanni gjøgnumganga fíggjartølini fyri 2009 einaferð enn fyri at vita, um til ber at spara enn meiri. Stýrið ger tað púra greitt, at tiltøkini í sambandi við fíggjarlógina fyri 2009 eru krepputiltøk, tí stýrið væntar, at tað bæði frá Setursins síðu og í Mentamálaráðnum verður arbeitt av øllum alvi fyri, at Setrið í komandi fíggjarári í øllum førum fær ta játtan, sum roknað varð við í 2009, og soleiðis hevur møguleika at seta tey leysu størvini í 2010. Eitt føroyskt Fróðskaparsetur kann ikki liva við, at tað ikki verður granskað og undirvíst í føroyskari søgu og føroyskum samfelagsviðurskiftum, tí hetta verður heldur ikki gjørt aðrastaðni.
Landstýriskvinnan og aðalstjórin í mentamálum høvdu fyrr á fundinum eina viðmerking til fíggjarstøðuna fyri 2009. Tey søgdu, at sum støðan er, er einki annað at halda seg til enn tann fíggjarlóg, sum varð samtykt fyri jól, men at landstýriskvinnan tó vildi gera tað, sum hon kundi, fyri at betra um støðuna.
Fíggjarjáttanin 2009 og møguligar sparingar á deildunum á Fróðskaparsetrinum verða viðgjørd aftur so skjótt sum stýrið hevur sett seg meira inn í málið.

**10. Rektarastarvið.**

Stýrið var avgjørt í sínari fatan av, at viðkomandi, sum skuldi setast í rektarastarvið, skuldi hava granskararoyndir umframt royndir og innlit í útbúgvingarøkið, gransking, leiðslu og samanspælið millum stovnin og samfelagið sum heild. Henda orðingin manglar í lógini fyri Fróðskaparsetur Føroya. Stýrið metir, hetta er sjálvsagt, av tí at hetta er vanligt í altjóða høpi, og tí tað í endamálsorðingini fyri Setrið smb. § 2 stendur, at: "Uppgáva Fróðskaparsetur Føroya er at inna gransking og veita frálæru sambært § 3. Endamálið er at grunda alla frálæru á gransking og veita frálæru á hægsta altjóða stigi." Stýrið vil virka fyri, at orðingin í lógini um krøv til rektara verður herd.

Stýrið metti, at í einari tillagingartíð og undir verandi ótryggu umstøðunum, sum Fróðskaparsetrið í løtuni er í, er tað sera umráðandi við kontinuiteti, so kunnleikin og vitanin, sum leiðslan hevur, ikki verða mist. Stýrið hevur stóra virðing fyri tí arbeiði, sum er framt á Fróðskaparsetrinum, og ynskir stabilitet í tí torføru støðuni, sum Setrið er í í løtuni.

Stýrið umrøddi møguleikar fyri eitt nú konstituering, áramálsseting og øðrum. Stýrið metti, at tað í tilgongdini við at samansjóða Sjúkrarøktarfrøðiskúlan, Læraraskúlan og deildirnar á Setrinum hevur stóran týdning at sleppa undan ótryggleika og atgerðarloysi. Uppskot vóru tí viðgjørd, hvussu innlit og leiðsluroyndir hjá verandi rektara, fyrisitingarstjóra, skúla- og deildarleiðslu kunnu vera við til at tryggja kontinuitet í avbjóðandi broytingartíðini fyri framman. Stýrið skuldi taka henda spurning upp við rektara og fyrisitingarstjóra og koma við einum útspæli sum skjótast.

11. **Reglugerð/kunngerð fyri Granskingardepilin fyri samfelagsmenning.**
Uppskot hevur áður verið lagt fram um nýggjar viðtøkur fyri Granskingardepilin fyri samfelagsmenning, men Mentamálaráðið metti, at bíðað skuldi verða eftir einari avgerð frá stýrinum hesum viðvíkjandi. Stýrið samtykti, at rektarin skuldi arbeiða víðari við reglugerðini og leggja hana fram á komandi stýrisfundi 12. mars 2009.

12. **Mál, sum stýrið ynskir at taka upp.**
Stýrið ynskir at fáa tilfar um ætlanir og visjónir fyri Fróðskaparsetrið sum skjótast. Hetta skal vera grundarlagið fyri strategiarbeiðinum, sum stýrið ynskir at seta í gongd. Arbeiðast skal bæði uppá stutt og longri sikt. Stýrið ynskir at vera eitt offensivt stýri, ið vil fremja framhaldandi menning av hægri útbúgving og gransking. Setrið skal kunna samanberast við onnur universitet í altjóða høpi. Tað verður eisini sera umráðandi at skipa so fyri, at føroyskir miðnámsskúlanæmingar aftur fáa álit á Fróðskaparsetrið, soleiðis at studentatilgongdin kann økjast munandi í framtíðini. Lunnar skulu leggjast undir ein realistiskan útbúgvingar- og granskingarpolitikk á Setrinum. Organisatión Setursins skal eisini takast upp til viðgerðar á komandi stýrisfundi, og ein tíðarætlan gerast fyri strategiarbeiðið.
Ein reglugerð skal gerast fyri stýrið og stýrisarbeiðið. Stýrið vil fegið, at tað skal vera møguleiki hjá observatørum at koma við til partar av stýrisfundunum, og at fólk verða kallað inn til stýrisfundir eftir tørvi. Samtykt varð, at hetta eisini er eitt mál, sum skal takast upp á stýrisfundi 12. mars 2009.

13. **Fundaætlan fyri várið 2009.** (J.nr. (3) 10-01-20070024).
Stýrisfundir várið 2009 verða 12. mars og 7. mai kl. 09.00-15.00.
Skype- ella IP-telefonifundur verður 10. februar kl. 17.00 føroyska tíð.

14. **Ymiskt.**
Eitt bræv frá álitisfólkum Starvsmannafelagsins á Setrinum varð lagt fram fyri stýrið. Stýrið tók brævið til eftirtektar.
Avgjørt varð, at formansskapurin skuldi hava fund við rektara og setursfyrisiting fríggjadagin tann 16. januar 2008 kl. 10-12.

RH/JPJ